# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Broyting**
*Bilradio á Rás2 hósdagin er flutt frá kl. 16.05 til kl. 17.15*
*Í sendingini er samrøða við Leon Heinesen, fyrrverandi vita-meistara, og við Petur Martin Johansen frá Mekonomen Billutir*





# Nýggj Triumph Thunderbird

MOTORSÚKKLUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Enska motorsúkkluverksmiðjan Triumph er komin á marknaðin við eini heilt nýggjari Thunderbird.

60 ár er liðin síðan fyrsta Triumph Thunderbird varð gjørd í 1949. Thunderbird varð skjótt sera væl umtókt, eisini á amerikanska marknaðinum, har Triumph vórðu nógv nýttar sum politi-motorsúkklur.

Nú kemur so tann nýggjasta Thunderbird, sum setur nýggjan standard í klassanum. Thunderbird er í støðd og klassa millum Triumph Speedster og tað størstu Triumph Rocket lll.

Thunderbird er ein hátøknilig súkkla við eini blanding av nýggjum og retro-designi. Motorurin er ein 2-syl.(paralell-twin) við 1596 cc og 86 hk. Hon hevur 6 gir og koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,8 sekund. Bensinnýtslan er 17,1 km/l í miðal. Thunderbird hevur tað eyðkenda motorljóðið, sum Triumph eru kendir fyri.

Triumph, sum MC-Sølan í Slættanesgøtu umboðar í Føroyum, er ein av elstu motorsúkkluverksmiðjunum í heiminum.

Verksmiðjan var stovnað sum súkkluverksmiðja í 1884, og framleiðslan av motorsúkklum byrjaði í 1902.

